*– Fyrst sigur Strandferðslan seg vilja ganga undir tær reguleringar, sum vit meta okkum eiga, og tá ið so málið er steðgað í gerðarrættinum, vil stovnurin kortini ikki fylgja sáttmálanum, men kemur við einum uppskoti, sum er viðfáningur, siga arbeiðstakarar hjá Bygdaleiðum*




Bussførarar við sáttmála:

# Kenna seg reyvrendar av SL

**- Vit halda, at Strandferðslan heldur okkum fyri tað turra spott. Stovnurin hevur okkum sum gíðslar. Vit hava ikki loyvi at fara í verkfall, og kravt verður av okkum, at tænastan skal vera 100%. Samstundis »snýtir« Strandferðslan okkum fyri lønarreguleringina, sum vit meta okkum eiga sambært sáttmálanum, siga arbeiðstakarar hjá Bygdaleiðum, sum Sosialurin hevur tosað við**

SÁTTMÁLASTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í eitt heilt ár hava bussførarar, sum hava sáttmála við Bygdaleiðir, stríðst við at fáa eina betri lønarregulering, men higartil hevur hetta ikki eydnast. Partarnir tulka sáttmálan so ymiskt, at talan er um miljónir á muni sum skilja partarnar. Allir arbeiðstakararnir, sum hava sáttmála við Bygdaleiðir, standa saman og hava fingið sakføraran hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, har teir eru limir, at taka sær av hesum máli.

– Tá ið vit lesa sáttmálan, er hann púra greiður. Onnur leiðsla var á Strandferðsluni, tá ið sáttmálin varð gjørdur og teir, sum sótu hinumegin borðið tá, eru samdir við okkum um reguleringarnar. Men tað er verandi leiðsla á Strandferðsluni eftir øllum at døma ikki.

Bussførararnir siga, at Strandferðslan bert vil regulera sáttmálan eftir almenna prístalinum, men hetta halda teir ikki samsvarar andanum í sáttmálanum, sum eisini leggur upp til reguleringar fyri eitt nú lønarhækkingar, príshækkingar fyri olju og tryggingar.

– Men hesar reguleringar hava vit ongantíð fingið, og tað halda vit er í stríð við sáttmálan.

Sum Sosialurin skilir, er talan um einar 3-4 miljónir krónur, sum skilja partarnar.

– Vantaða reguleringin er nú við at sláa beinini undan teimum arbeiðstakarum, sum hava teir lakastu sáttmálarnar, og hetta kunnu vit slett ikki góðtaka.

Tað eru einir níggju arbeiðstakarar kring landið, sum hava høvuðssáttmála við Bygdaleiðir, og síðan eru aftur fleiri undirsáttmálar.

### Fyri spott

Í sáttmálanum millum Bygdaleiðir og arbeiðstakararnar stendur, at ósemjur partanna millum skulu leggjast fyri gerðarrætt.

– Sakførari okkara legði málið um reguleringina – ella vantaðu reguleringina – fyri gerðarrætt, men áðrenn málið kom til avgreiðslu, ásannaði Bygdaleiðir, at vit hava rætt í okkara tulkingum av sáttmálanum. Tí varð málið í fyrstu atløgu steðgað.

Arbeiðstakararnir siga, at seinni vóru teir saman við sakføra sínum á fundi við Strandferðsluna, har stovnurin skjeyt upp, at partarnir skuldu finna eina »semju«.

– Men vit kundu als ikki góðtaka ta semju, sum teir skutu upp, tí hon á so langt burtur frá tí, sum vit sambært sáttmálanum meta okkum eiga.

Arbeiðstakararnir siga, at málið tískil aftur er reist í gerðarrætti og kemur til avgreiðslu í seinasta lagi einaferð tíðliga í summar.

– Vit kenna okkum hildnar fyri ta turra spott. Fyrst sigur Strandferðslan seg vilja ganga undir tær reguleringar, sum vit meta okkum eiga, og tá ið so málið er steðgað í gerðarrættinum, vil stovnurin kortini ikki fylgja sáttmálanum, men kemur við einum uppskoti, sum er viðfáningur. Vit kenna okkum sum gíðslar í hesum máli. Vit hava ikki loyvi at fara í verkfall, og kravt verður av okkum, at tænastan skal vera 100% – og samstundis »snýtir« Strandferðslan okkum fyri lønarreguleringina.

### Bukka undir

Arbeiðstakararnir spyrja, um landsstýrismaðurin, sum umsitir Strandferðsluna, er kunnaður um, hvussu stovnurin fer við sínum arbeiðstakarum.

Sáttmálarnir eru galdandi í fimm ár, og teir flestu arbeiðstakararnir hava hálvt triðja ár eftir. Onkur sáttmáli er gjørdur eitt sindur seinni, og gongur tí eisini út eitt sindur seinni.

Men hvat kann so í ringasta føri spyrjast burtur úr, um reguleringin ikki kemur upp á pláss, soleiðis sum arbeiðstakararnir høvdu væntað, tá ið teir bjóðaðu upp á ruturnar?

– Tað kann henda, at onkur, sum hevur ein lakari sáttmála, ikki klárar at koyra alt skeiðið, og tískil noyðist at gevast – um lønarreguleringin ikki kemur upp á pláss, siga bussførararnir at enda.

Reguleringin:

# SL framvegis onga viðmerking til málið

**– Eg vildi fegin havt okkurt at sagt tykkum, men eg haldi ikki, tað er rætt av mær at úttala meg alment um hetta mál, sigur Andrass Jensen, deildarleiðari á Bygdaleiðum og Oyggjaleiðum**

SÁTTMÁLASTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin royndi í gjár at fáa eina viðmerking um lønarreguleringina, sum teir, ið koyra fyri Bygdaleiðir, halda seg sambært sáttmálanum eiga til góðar hjá Strandferðsluni, men stjórin á Strandfaraskipum Landsins, Kristian Davidsen, var burturstaddur.

Vit hittu tó Andrass Jensen, sum er deildarleiðari á samferðsludeildini, ið hevur Bygdaleiðir og Oyggjaleiðir undir sær.

Sosialurin hevur áður tosað við Andrass um hetta mál, men tá segði hann seg ikki hava hug at gera viðmerkingar til málið.

### Eingin viðmerking

Svarið, vit fingu í gjár, var ikki øðrvísi enn hitt fyrra.

– Eg vildi fegin havt okkurt at sagt tykkum, men eg haldi ikki, tað er rætt av mær at úttala meg alment um hetta mál. Tað er heldur ikki eg, sum úttali meg vegna stovnin í slíkum málum.

Spurdur, um hann heldur, at stjórin, Kristian Davidsen, er kunnaður um málið um umstríddu lønarreguleringina, sigur Andrass, at tað vildi hann hildið, at hann er.

– Eg eri ikki fult uppdateraður um málið beint nú, ásannar Andrass og heldur fyri, at skal hann koma við einum svari, noyðist hann í fyrsta lagi at tosa við sítt bakland, sum er stjórin, Kristian Davidsen og sakførarin, Anfinn V. Hansen.

– Men tað er harmiligt, at eitt slíkt mál sum hetta uppstendur, sum Andrass Jensen tekur til.